

*Fernando Alonso vann sín fjórða sigur í ár, hann líkist einum heimsmeistara.*

*Mynd: Reuters*

# Alonso vinnur á Nürburgring

**Renault hava aftur fingið viðvind, og Fernando Alonso er nú 32 stig framman fyri Jarno Trulli og Kimi Räikkönen á deildum øðrum plássi í heimsmeistara-kappingini í Formel 1**

FORMEL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Finski McLaren Mercedes koyrarin Kimi Räikkönen fór inn í síðstu umferðina á odda fyri evropeisku koyringina, men tá spanski Fernanso Alsono góðan hálvan annan minutt seinni koyrdi fyrstur um málstrikuna, stóð Kimi Räikkönen við síðuna av breytini við sínum brotna Mercedes. Okkurt fremst á bilinum var brotna og vinstra framhjól datt av, og bilurin sendist runt á breytini.

Nick Heidfeld hevði tryggja sær fyrstu byrjunarstøðu, men misti fyrsta plássið til Räikkönen í sjálvari byrjanini. Bæði Räikkönen og Alonso høvdu valt bert at steðga tvær ferðir eftir bensini, Heidfeld steðgaði tríggjar ferðir, og triðja steðginum fór Alonso framvið. Men við Räikkönen úti fekk týskarin aðru viku á rað annað pláss.

David Coulthard varð heilt stóra jaliga uppliving-in á Nürburgring. Eina løtu lá skotin á fyrsta plássi í sínum Red Bull bili, og tað hevði eingin spátt áðrenn ársbyrjan. Hann hevði ivaleyst kunna fingið triðjapláss, men hann koyrdi ov skjótt í pittinum og varð revsaður við at skula koyra gjøgnum pittin umaftur. Hetta gav brasilianska Ferrarikoyraranum Rubens Barrichello síðsta trinið á sigurskamlinum.

Liðfelagin hjá Barrichello Michael Schumacher gjørdi ikki nógv um seg, og endaði á fimta plássi..

Tann seinni Renault bilurin við italiumanninum Giancarlo Fisichella steðgaði upp, tá koyringin skuldi byrja, og varð tí noyddur at byrja aftast úr pittinum. Men við støðugari og góðari koyring arbeiddi hann seg upp til eitt sætta pláss.

Í fyrsta svingið rendi BMW-Williams førarin Mark Webber á McLaren Mercedes bilin hjá Juan Pablo Montoya. Webber fekk ikki hildið fram, og Montoya misti fleiri pláss. Montoya stríddist alla koyringina, og endaði á einum sjeynda plássi.

Síðsta stigið fekk Jarno Trulli, Tøkningarnir hjá Trulli brutu tíðarfreistina fyri at fara av breytini, áðrenn byrja verður at koyra. Hetta varð Trulli revsaður fyri og skuldi koyra ígjøgnum pittin. Liðfelagin hjá Trulli Ralf Schumacher hevur verið sera óheppin í ár, hetta varð eisini galdandi sunnudagin. Hann mistið gronina og forveingirnar á sínum Toyota í hendingini millum Webber og Montoya. Í síni roynd at koma aftur koyrdi hann útav og noyddist at gevast.

Red Bull Racing kunngjørdi í seinastu viku, at frá næstu koyring, sum verður í Kanada um tvær vikur, eitur annar koyrarin hjá liðnum David Coulthard og hin Christian Klien. Liuzzi fekk sostat eitt síðsta høvið, at vísa hvør dugur var í honum. Henda møguleika kundi hann havt brúkt betur. Hann fekk eitt níggjunda pláss 40 sekund aftan fyri liðfelagan David Coulthard. Men hann mundi ikki komið á mál, tí stutt áðrenn endan varð hann um at renna á pitveggin.

BAR-Honda høvdu stórar vónir áðrenn koyringina, men við Button nummar trettan og Sato sekstan í tíðarkoyringini, vórðu tær vónirnar nakað væl verri, og tá hvørgin teirra megnaði upp í stigini í koyringini, sær árið sera truplt út fyri BAR-Honda.

Samanumtikið eru Renault og kanska serliga Alonso aftur á sigurskós. Räikkönen er nú rættuliga langt aftan fyri Alonso í stigatali. Men einki er avgjørt enn, enn eru tólv koyringar eftir. Tað einasta, sum stendur greitt, er, at nógv ár eru síðan, so nógv lið bardust so tætt um stigini í formel 1.

## Úrslitið á Nürburgring

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso | Renault | Italia | |
| 2 | Nick Heidfeld | Williams-BMW | Týskland | +16.5 sekund |
| 3 | Rubens Barrichello | Ferrari | Brasilia | +18.5 sekund |
| 4 | David Coulthard | Red Bull Racing | Skotland | +31.5 sekund |
| 5 | Michael Schumacher | Ferrari | Týskland | +50.4 sekund |
| 6 | Giancarlo Fisichella | Renault | Italia | +51.9 sekund |
| 7 | Juan Pablo Montoya McLaren | Mercedes | Kolumia | +58.1 sekund |
| 8 | Jarno Trulli | Toyota | Italia | +71.0 sekund |
| 9 | Vitantonio Liuzzi | Red Bull Racing | Italia | +71.5 sekund |
| 10 | Jenson Button | BAR-Honda | England | +95.7 sekund |
| 11 | Kimi Räikkönen | McLaren-Mercedes | Finnland | +1 umferð |
| 12 | Takuma Sato | BAR-Honda | Japan | +1 umferð |
| 13 | Jacques Villeneuve | Sauber-Petronas | Kanada | +1 Lap |
| 14 | Felipe Massa | Sauber-Petronas | Brasilia | +1 Lap |
| 15 | Tiago Monteiro | Jordan-Toyota | Portugal | +1 Lap |
| 16 | Narain Karthikeyan | Jordan-Toyota | India | +1 Lap |
| 17 | Christijan Albers | Minardi-Cosworth | Holland | +2 Laps |
| 18 | Patrick Friesacher | Minardi-Cosworth | Eysturríki | +3 Laps |
| Givin | Ralf Schumacher | Toyota | Týskland | +26 Laps |
| Givin | Mark Webber | Williams-BMW | Avstralia | +59 Laps |

## Liuzzi í Evropa, Klien í Kanada og restina av árinum

FORMEL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Liuzzi megnaði ikki at tryggja sær eina framtíð í Formel 1, men fekk sunnudagin ein seinasta møguleika at gera ein vørr. Tað gekk ikki so væl

Ein av stóru spurningunum í formel 1 heiminum hesa seinastu vikurnar hevur verið, hvør fór at koyra fyri Red Bull Racing í evropeisku koyringini á Nürburgring. Fyrstu tríggjar koyringarnar koyrdi eysturríkarin Christian Klien fyri liðið. Hann fekk eitt sjeynda pláss í Avstralia, eitt áttanda pláss í Malaysia og varð noyddur at gevast í Bahrain. Í næstu koyringini í San Marino varð Klien settur á beinkin. Inn kom italiumaðurin Vitantonio Liuzzi. Hann fekk eitt áttanda pláss í síni fyrstu roynd, men bæði í sponsku koyringini og koyringini í Monako varð hann noyddur at gevast.

Red Bull kunngjørdi áðrenn San Marino, at Liuzzi skuldi royna seg í tríggjar koyringar, og áðrenn evropeisku koyringina á Nürburgring fór avgerð at verða tikin, um hvør skuldi koyra restina av kappingarárinum. Mikudagin varð avgerðin tikin, og hetta merkti, at Liuzzi slapp at royna seg Nürburgring, meðan Klien fær seinna Red Bull setrið frá koyringini í Kanada 12. juni og restina av árinum. Á Nürburgring sunnudagin gjørdi Liuzzi lítið um seg og megnaði bert eitt níggjunda pláss í mun til liðfelagan Coulthard, sum kappaðist heilt fremst og endaði á fjórða plássi.

Fyrsta setrið hjá Red Bull hevur David Coulthard. Hann hevur veruliga livað upp til ábyrgdina. Red Bull liðið, sum æt Jaguar í fjør, hevði eingin væntað nakað av, áðrenn kappingarárið byrjaði. Men inntil Monako hevði liðið fingið stig í øllum koyringum. Og fjórða plássið í evropeisku koyringini var aftur ein álitisváttan til Coulthard. Hann hevur nú 16 stig.

Coulthard hevur, áðrenn hann í ár flutti til Red Bull, koyrt fyri Williams, har hann avloysti Ayrton Senna, tá hesin doyði í 1994, og seinnu árini fyri McLaren. Hann hevur ferð eftir ferð sæð liðfelagar gerast heimsmeistarar, og hevur ofta koyrt í skjótasta bilinum, uttan at gerast heimsmeistari. Men spurningurin er, um orsøkin til, at Coulthard hevur sitið í skjótasta bilinum so ofta, er Coulthard sjálvur. Hann hevur verið við til at royndarkoyra og menna bilarnar, til at gerast teir bestu.

Jaguar Formula one var ein ómetaliga dýr verkætlan hjá Ford, sum ongantíð gjørdist væleydnað, bilarnir kláraðu seg ongantíð væl. Men nú Red Bull hevur keypt liðið, og Coulthard er vorðin koyrari, gongur framúr væl.